# einfaldari
- ger tað einfaldari

Mai 2010


## Serligt tiltak fyri hoyvíkingar



*Listakvinnurnar Edith Mørkøre og Astrid Mouritsen høvdu málningaframsýning í skúlanum*

Leygarkvøldið 17. apríl var eitt serligt tiltak í Skúlanum við Løgmannabreyt. Samkoman hevði sent innbjóðing í hvørt hús í Hoyvík, har fólk vórðu boðin til eitt hugnakvøld.

Á skránni var m.a. ein framløga um Lívdina. Eisini greiddu bæði ung og gomul frá, hví tey høvdu valt samkomuna Lívdina til sítt andaliga heim. Unn Zachariassen hugleiddi um lívsgleði, og búktalarin Kornelius greiddi frá sínum upplivingum á Blankaskála. Eisini vóru sangframførslur og felagssangur.

Ein framsýning var í skúlanum við málningum hjá listakvinnunum Edith Mørkøre og Astrid Mouritsen, sum báðar búgva í Hoyvík.

Endamálið við tiltakinum var at kunna fólk í Hoyvík um, hvat Lívdin er og stendur fyri.

## Halgað til Kristus og samkomuna

Munurin á einum, sum bert ”gongur á møti“, og á einum, sum hevur gjørt samkomuna til ”andaliga heim sítt”, kann sigast við einum orði: Halgan.

Samkoman er ein familja, og bert um øll eru halgað familjuni, verður familjulívið so gott, sum tað eigur at vera. Tann, sum ikki er halgaður samkomuni, kennir als ikki somu gleði og tað frælsi sum tann, ið er halgaður samkomuni. Hann kennir heldur ikki somu ábyrgdarkenslu fyri øðrum, sum ganga í samkomuni, sum tann, ið elskar brøður og systrar sínar.

Hvussu við tær? Hevur tú halgað teg til samkomuna, ella ert tú ein, sum gongur á møti uttan at vilja halga teg og taka nakra ábyrgd? Kom við! Halga teg til Kristus og samkomu Hansara!



*Jógvan Zachariassen*

# Lívdin

### Ronja fekk takkarbræv úr Rumenia

Í sambandi við at børn í Føroyum senda skógvaeskjur við gávum til onnur børn úti í heimi gjøgnum tiltakið Christmas Child, fekk Ronja Heinadóttir Egholm í Havn herfyri post úr Rumenia við einum brævi og eini tekning.

Bævið var frá eini gentu, sum eitur Marina. Tað er pastorurin Adrian Arseni, sum hevur sent brævið fyri hana. Hann skrivar m.a. at Marina er til aldur sum Ronja (8-9 ár), og hon varð sera glað fyri pakkan og teknaði myndina sum tøkk. Tey búgva í einum lítlum býi í Rumenia, sum eitur Piatra Neamt.

Adrian endar brævið við Jóh. 4:10, har hann sigur, at Jesus er gávan frá Gudi til okkum, og Bíblian lærir okkum, at tað er meira umráðandi at geva enn at fáa. So hann vildi uppmuntra okkum í Føroyum til at halda áfram at geva.



*Ronja við myndini sum Marina í Rumenia hevur teknað*

### Hyperlink og Alive

Hyperlink og Alive eru tvey nýggj hugtøk, sum vit skulu venja okkum við.

Eftir at freistin var úti til navnakappingina um nýggj nøvn til ungdómstiltøkini í Lívdini fríggjakvøld á Brekku og leygarkvøld í Skúlanum við Løgmannabreyt, vórðu nøvnini avdúkað á møtinum páskadag sunnudagin 4. apríl.

Vinnandi uppskotini vóru HYPERLINK til ungdómstiltakið fríggjakvøld og ALIVE til ungdómstiltakið leygarkvøld. Vinnararnir vóru Birgitte Viderø Gunnarsson og Anna Sofía Mohr, sum fingu hvør sítt stórt páskaregg.



*Birgitte Viderø Gunnarsson og Anna Sofía Mohr.*
*Mynd: Tórvør Vang*

### Til lukku við barninum

9. apríl fingu Sóley og Tór Arni Samuelsen ein son. Hann vigaði 4.000 gr, var 56 cm langur og eitur Jónatan.



*Stóribeiggin Villiam Marius við lítlabeiggjanum Jónatan*

# Tiltøk

## Tiltøk á Brekku 3

(bygningurin aftan fyri MBM)



**Undirvísing og bøn týskvøld kl. 20.00**

| | |
|---|---|
| 4. mai: | Bønarmøti |
| 11. mai: | Bønarmøti |
| 18. mai: | Kyknubólkar |
| 25. mai: | Bønarmøti |

---

### Zareptalegan 2010

Samkomulegan hjá Lívdini á Zarepta verður frá 7. til 9. mai.

Evnið á leguni verður: “Aftur til krossin”. Vit hava valt hetta evnið, tí okkum tørvar aftur og aftur at verða mint á týdningin av krossi Kristusar.

Fríggjakvøldið fara vit at tosa um ræðuleikan við krossinum. Leygarmorgunin fara vit at tosa um kross Kristusar sum grundarlagið fyri trúgv og lívi okkara. Leygarkvøldið tosa vit um kross Kristusar og krossin, sum Kristus biður okkum bera. Sunnumorgunin fara vit at tosa um týdningin av aftur og aftur at koma og boyggja okkum við kross Kristusar.

Vit fara at heita á tykkum um at biðja fyri leguni, og vit vóna, at vit øll koma vestur til eitt ógloymandi vikuskifti saman við systrum og brøðrum okkara.

*JZ*






*Myndir frá samkomulegum hjá Lívdini á Zarepta*
*Myndir: Pauli Djurholm*




Vitja heimasíðuna hjá teimum ungu í Lívdini, ung.livdin.fo :-)

## Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

**Sunnudagin 2. mai**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Missiónsfelagsskapir og møguleikar*
*Talari: Jógvan Zachariassen*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Missión*
*Talari: Ian Burness*
** Innsavning til nýggja bygningin*


Jógvan

**Sunnudagin 9. mai**
Einki møti - samkomulega á Zarepta

**Sunnudagin 16. mai**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Vitnisburður frá Alpha-skeiðnum*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Varðveit hjarta mítt*
*Talari: Jákup Jacobsen*


Jákup

**Sunnudagin 23. mai**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Hvat er hvítusunna*
*Talari: Guttorm Joensen*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Hvítusunnudagur*
*Talari: Johan Syderbø*


Guttorm

**Sunnudagin 30. mai**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Avgerandi løtur í lívi mínum*
Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Hvussu Skulu vit so ikki liva.*
*Rómbrævið 13: 11-14.*
*Talari: Jógvan Zachariassen*


Johan

**Tiltøk:**
Leygarkvøldið 1. mai: Alive
Leygarkvøldið 15. mai: Alive
Leygarkvøldið 22 mai: Alive
Leygarkvøldið 29 mai: Alive

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*